# Westward Ho aftur á Havnina

**Gongur sum ætlað, verður gamla sluppin Westward Ho aftur á Havnini í oktober mánaði. Seinastu tvey árini hevur hon ligið í Fraserborough, har ógvuliga umfatandi umvælingar hava verið framdar. Nú sæst tó ein endi á arbeiðnum, og ætlanin er, at sluppin sjálv skal sigla heim í seinnu helvt av oktober**

WESTWARD HO
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Soleiðis sá sluppin út í 2002 beint áðrenn hon varð send til umvælingar*

*Mynd: Savnsmynd*

Tað er Grunnurin Sluppin, ið var stovnaður í 1962, til tess at vísa nú- og eftirtíðini hvørjum korum fiskimenninir livdu og arbeiddu undir, ið hevur tikið stig til at umvæla Westward Ho.

Í 1966 keypti Grunnurin Sluppin Westward Ho frá táverandi eigaranum á Tvøroyri. Sluppin lá síðani á Havnini og silgdi mest leigutúrar. Tað eru m.a. frá hesum leigutúrunum, at fíggingin til umvælingina er komin. Eisini er góður stuðul fingin bæði frá privatum og almennum.

Síðani 1997 hevur Grunnurin arbeitt ítøkiliga við umvælingar verkætlanini, og fyri uml. tveimum árum síðani, fór gamla sluppin til Fraserborough, har umvælingin er farin fram.

Tað hevur gingið seint við umvælingini, tí alt er goldið so hvørt. Fyrsti partur av arbeiðnum var at skifta dekkið og bondini í skrokkinum og at kalfatra. Síðani lá arbeiðið leingi stilt, tí fígging skuldi útvegast til næsta byggistig. Sostatt hevur sluppin onga skuld, hóast hon nú at kalla er gjørd av nýggjum.

### Tórshavnar býráð í myndina

Í Nevndini í Grunninum Sluppin eru Egil Simonsen, formaður, Leo Clothier, Jónsvein Lamhauge, og Christian Christiansen. Nevndin hevur fyriskipað alt arbeiðið við at umvæla Westward Ho, tó við góðari hjálp frá fólki, ið hava verið fús at rætt eina hjálpandi hond. Nógv sjálvboðið arbeiði er gjørt umborð, og tað hevur uttan iva spart Grunninum nógvar krónur. Tórshavnar Skipasmiðja mátaði og teknaði sluppina upp til endaliga umvælingararbeiðið, sum varð framt í Skotlandi.

Ein annar av dyggu stuðlunum hevur verið Tórshavnar býráð, sum kom uppí verkætlanina eftir at fyrsta byggistig var liðugt. Býráðið fer eisini at eiga sluppina, tá hon kemur til Havnar aftur og Grunnurin Sluppin fellur somuleiðis undir býráðið. Býráðið fer harvið at hava fullan avgerðarrætt til, hvussu sluppin skal nýtast.

### Bygd av nýggjum

Jónsvein Lamhauge, havnameistari, hevur verið umboð fyri Tórshavnar Kommunu í nevndini. Hann fegnast um, at endi nú sæst á arbeiðnum, sum hevur gingið nakað seinni enn væntað. Á heimasíðuni hjá Westward Ho sæst nevniliga, at ætlanin upprunaliga var, at fáa sluppina klára til tá Norðuratlantsbryggjan lat upp í 2003. Hetta eydnaðist tó ikki. –Arbeiðið hevur gingið so striltið, tí vit máttu finna fígging ímillum hvørt byggistig. Nú vóna og vænta vit bara, at írestandi arbeiðið gongur sum tað skal, soleiðis at sluppin kann koma heim síðst í oktober, sigur hann.

Jónsvein sigur, at sluppin faktiskt er gjørd av nýggjum. – Bæði dekkið, skrokkurin, seglið, rigningur, lugarið og allar tekniskar innleggingar eru nýggjar. Alt er tó bygt sum tað var á gomlu sluppini. Hon skuldi sostatt sæð út sum hon gjørdi, tá hon fór til umvælingar. Har lastin var, hava vit tó fingið eina salong nú, men vit hava roynt at havt alt í sama stílið, greiðir Jónsvein Lamhauge frá.

Hann sigur, at ætlanin er, at skúlar skulu kunna gera brúk av Westward Ho, soleiðis, at næmingarnir kunnu fáa eina mynd av, hvussu sjólívið var. Eisini fer hon at gera útferðir og styttri túrar. – Tað verður býraði, ið fer at hava avgerðarrættin, men hetta er ætlanin, sigur Jónsvein. Hann sigur, at arbeiðið umborð á sluppini fer at verða sjálvboðið.

– Áðrenn sluppin fór til umvælingar, høvdu vit ein stóran skara av fólki, ið vóru áhugað í sluppini, og sum gjørdu eitt stórt sjálvboðið arbeiði. Vit vóna at fáa fatur í tey fólkini, nú tá sluppin kemur heimaftur, sigur Jónsvein. Hann sigur tað ongan iva verða um, at áhugin framvegis er stórur. – Tað eru heilt víst ógvuliga nógv fólk, ið hava áhuga í sluppini, sigur hann. – So vit vóna, at tey fara at taka ímóti sluppini sum eitt frítíðarítriv.

Westward Ho fer at sigla um summarið, og um veturin verður høvi at nýta hana til ymisk mentanarlig tiltøk. Ætlanin er, at hon skal fáa sítt gamla pláss á Havnini aftur, nevniliga undir Müllers Pakkhúsið.

### Fólk til jomfrútúrin

À heimasíðuni hjá Westward Ho, er ein lýsing eftir áhugaðum fólki, at sigla sluppina aftur til Havnar. – Vit hava ikki sett nøkur førleikakrøv sum so, men ætlanin er, at tey, ið fara niður eftir skipinum, skulu rigga tað síðsta til, t.d. at sláa seglið undir hana. So tað er sjálvsagt ein fyrimunur, um tað koma fólk, ið vita hvat tað snýr seg um. Ætlanin, við at søkja eftir fólki, er eisini at knýta fólk til sluppina, sigur Jónsvein. Hann sigur, at eftirsum størsti parturin av arbeiðnum framyvir fer at verða sjálvboðin, er gott at hava nøkur fólk knýtt at skipinum.

Í vikuni verður motorurin settur í, og mastrar og rundholt fara niður í komandi viku.

Tey, ið hava hug at mynstra fyrsta túrin skulu seta sær eina viku av, tí seglini sum sagt skulu riggast til, áðrenn lagt verður frá landi.

Áhugað kunnu venda sær til Poul Clementsen á vit5@post.olivant.fo. Enn er endaligi fráfaringardagurin ikki fastlagdur.




*Sluppin var ógvuliga illa farin og skuldi hon framhaldandi kunna sigla, var alneyðugt við eini stórari umvæling*

*Mynd: Savnsmynd*







*Umvælingarnar bæði innan og uttan eru nú komnar so langt áleiðis, at sluppin væntandi verður aftur í Havn síðst í oktober. Sluppin er at kalla bygd av nýggjum*

*Myndirnar eru tiknar av heimasíðuni hjá Westward Ho www.westwardho.fo*



# Rigga Eystnes til í Runavík




*Skipið er bygt í 1975, men hevur fingið nýggja epetering og nýggjan høvuðsmotor. Væntandi verður klárt at loysa um einar tveir mánaðir*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Línubáturin, Eystnes, sum P/F Linefish á Strondum hevur keypt úr Noregi, verður nú riggaður til í Runavík. Skipið verður klárt at fara til fiskiskap um einar tveir mánaðir og fær loyvini hjá Tummasi Nygaard og Morning Star**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Felagið, P/F Linefisk, sum hevur keypt línubátin, Husøy úr Molde í Noregi, gjørdi ikki nógv burtur úr, tá ið skipið fyrstu ferð kom til landið hósdagin í seinastu viku.

Skipið er heimahoyrandi á Strondum, men legði beinleiðis at í Runavík, har Mekanik er farið í holt við at yvirhála høvuðsmotor og ljósmotorar. Ymiskt skal gerast við skipið, áðrenn tað um einar tveir mánaðir verður klárt at fara til fiskiskap.

### Mekanik og FJM

Reiðarin, Dánjal Jákup Vilhelm, sigur, at skipið í fyrsta lagi verður klassað.

– Hetta er eitt frystiskip, og tí skal lastin avriggast og byggjast til ísfiskalast. Hetta verður ein kassalast eins og umborð á Tummasi Nygaard og Fugltúgvuni, har hvør kassi verður 90 litrar.

Hann sigur, at arbeiðsdekkið skal eisini broytast, og pavnaskipanin skal broytast.

– Tað verða fyrst og fremst Mekanik og FJM, sum koma at taka sær av tí, sum gerast skal við skipið.

Dánjal Jákup sigur, at Eystnes kemur í flotan fyri Tummas Nygaard og Morning Star, sum er søktur.

– Tummas Nygaard verður í vinnu, til Eystnes er klárur. Síðan verður hann lagdur og væntandi seldur.

Reiðarin sigur, at áhugi er fyri Tummasi Nygaard, sum er bygdur á Vestmanna Skipasmiðju í 1972.

### Størri skip

Eystnes er eitt størri skip enn Tummas Nygaard. Hann er nevniliga sjey metrar longri.

Skrokkurin á skipinum, sum P/F Linefish hevur keypt, er bygdur í 1975, men skipið fekk nýggja apetering í 1997 og nýggjan høvuðsmotor, skrúvu og drívaksil í 1998.

Dánjal Jákup metir, at hetta verður eitt gott skip við góðum manningarumstøðum, tá ið klárt er at fara til fiskiskap. Øll kømrini umborð eru tvey-manskømur.

Við Eystnesi verða 14 mans, og skipari verður Jákup Eli Ejdesgaard av Eiði, sum annars er skipari á Tummasi Nygaard. Avloysarin hjá honum er Jón Matras, sum er gjáarmaður, ið býr á Eiði. Hann er skipari við Tummasi Nygaard hendan túrin, teir nú eru úti.

Dánjal Jákup Vilhelm, er eisini reiðari á Fugltúgvuni, sum P/F Torvanes eigur.

– Hetta eru tvey ymisk skip og tvey ymisk feløg, sum eru púra leys av hvørjum øðrum, sigur hann.

### Gott mót

Reiðarin hevur gott mót um, at tað fer at bera til at fáa raksturin hjá Eystnesi at hanga saman.

– Tað hevur gingið væl hjá línubátunum seinastu árini, og árið í fjør var eisini eitt gott ár. Árið í ár er slakari, men brúkiligt kortini, sigur hann.

Dánjal Jákup Vilhelm sigur, at lítil toskur er at fáa í løtuni, men hýsan er við at taka seg upp, sum hann tekur til.

– Sum er, er tó ein ov stórur partur av veiðini brosma og longa, og hesi fiskasløgini hava ikki so góðan prís, leggur hann aftrat.

# Fugltúgvan landar á Toftum

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hósmorgunin landaði línubáturin, Fugltúgvan, á Toftum.

Veiðan hendan túrin var 65.000 pund, harav 16.000 pund var hýsa, 8.000 pund toskur, meðan restin var longa og brosma.

Reiðarin, Dánjal Jákup Vilhelm, sigur, at skipið ætlandi fer avstað aftur leygardagin.

– Helst verður farið undir Føroyar, men tað hevur eisini verið upp á tal at fara til Ísland, har skipið eigur kvotu eftir.

Skipari á Fugltúgvini hendan túrin hevur verið Suni Dam á Norðskála, sum er sonur fasta skiparan, Andrias Dam.

Tað er P/F Torvanes, ið eigur Fugltúgvuna, sum er skrásett á Eiði.

Dánjal Jákup Vilhelm er reiðari á Fugltúgvuni og Tummasi Nygaard, sum skjótt verður avloystur av línubátinum, Eystnesi, sum P/F Linefish hevur keypt úr Noregi.

## Nýtt toskaævintýr

**Grønland:** Grønlendskir granskarar droyma í hesum døgum heitar dreymar um eitt nýtt toskaævintýr í Grønlandi. Orsøkin til bjartskygni er, at granskarar hava staðfest, at havið rundan um Grønland verður heitari. Mett verður, at heitari sjógvur kann fara at geva grønlendingum tað, sum teir leingi hava bíðað eftir, nevniliga eitt nýtt toskaævintýr.

Granskararnir siga, at havið rundan um Grønland er vorðið 2-3 stig heitari seinastu árini. Sjógvurin er við øðrum orðum líka so heitur, sum hann var í 1960-árunum, sum vóru gullárini fyri toskafiskiskapi í Grønlandi. Men eftir nøkur ógvuliga góð ár, rýmdi toskurin aftur.

Ymiskar meiningar eru um orsøkina til, at toskurin rýmdi, men ein verður hildin at vera, at havstreymarnir broyttust og harvið eisini hitin í sjónum.

Sagt verður, at um toskurin er á veg aftur í grønlendskan sjógv, kemur tað helst at taka eini 5-10 ár, áðrenn stórar nøgdir av toski aftur kunnu fiskast undir Grønlandi.

**-v.**

## Høgir tunfiskaprísir

**Equador:** Lítil tunfiskaídnaður er í Equador í hesum tíðum, tí so lítil fiskur kemur uppá land. Men einki er so ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt. Slaki fiskiskapurin hevur trýst prísirnar rættiliga langt upp. Tunfiskaprísirnir í heyst hava nevniliga verið teir hægstu í mong ár.

Óvanliga støðan í tunfiskaídnaðinum hevur nú elvt til, at tunfiskur fer fyri 1500 us-dollarar fyri tonsið. Hetta er 110% meira, enn prísurin var í byrjanini av hesum árinum.

Talan er í hesum sambandi um fisk, sum vigar meira enn 20 pund.

Vánaligi tunfiskiskapurin hevur samstundis ført til, at tað gongur striltið hjá framleiðarum í Equador at nøkta eftirspurningin eftir tunfiski.

**-v.**



*Vánaligur tunfiskiskapur hevur ført til, at prísurin á tunfiski er øktur 110% í ár*

## Nýtt eitur í Noregi

**Noreg:** Fyri fyrstu ferð er eiturið, perfluoroktyl sulfonat (PFOS), staðfest í Noregi. Eiturið, sum er funnið í Mjøsa, verður hildið at vera krabbameinselvandi. Eisini verður hildið, at eiturið kann elva til fosturskaðar og gera immunverjuna veikari.

Tað er norska Hamar Arbeiderblad, sum ber hesi tíðindi.

At PFOS-eiturið er funnið júst í Mjøsa, halda serfrøðingar ikki vera so løgið, tá ið onnur eiturevni, eitt nú kiksilvur, PCB og eisini dioxsin, áður eru funnin í økinum.

**-v.**